**TIL SØLU**
Eitt sera vakurt fjarstýrt flogfar við motori og servo-/um, klart at flúgva við, til sølu fyri 2.300 kr. Nýprísur yvir 4.500 kr
Tlf. 18365

**YNSKIST**
Stórur fjarstýrdur bátur, helst fraktbátur, ynskist til keyps.
Tlf. 10278

**TIL SØLU**
Myndatól OM 10, 3 linsur 28 mm, 50 mm og 75-260 mm, 1 blitz og ein fototaska. Alt fyri einans 3.000 kr.
Tlf. 21668

**TIL SØLU**
Turt, føroyskt kjøt: tjógv og bógvar, og nakað av garnatálg
Tlf. 32954

**YNSKIST**
Uppvarpari (over headari) ynskist til keyps. Vendið tykkum til BB v/ Annfinn Danielsen,
Tlf. 11936 - 17092

**YNSKIST**
Nakað av biligum byggitilfari ynskist til keyps, so sum gólvplátur, bjálving, undirsløg, 3x2, byggiplátur og ymiskt annað
Tlf. 23454 / 17124

**REINGERDARHJÁLP**
Er tað nakar, sum ynskir hjálp til reingerðing, eru tygum vælkomin at ringja
Tlf. 11161, lokal 26

**2 FERÐASEÐLAR**
til Aberdeen v/ atgongumerki til Cliff Richard konsertina, til sølu
Tlf. 13839 ella 13337.

**TIL SØLU**
Ein arkivreol úr stáli, 24 hillar, hvør 40x75
Tlf. 14972

**TIL SØLU**
Ein ferðaseðil við Smyrli 1 apr. til Cliff Richard konsertina í Aberdeen, til sølu
Tlf. 13101

**TIL SØLU**
3 hondknýtt teppi til sølu á Blindastovninum: 1 reytt mynstrut, 195x150 cm. 1 ljóst einlitt, 165x96 cm. 1 ljóst einlitt, 132x96 cm.
Tlf. 18222

**ARBEIÐI SØKIST**
Tilkomin kvinna søkir arbeiði í Streymoynni. Alt hevur áhuga
Tlf. 21125

**ARBEIÐI YNSKIST**
Alt arbeiði innan dreyging, sveising, maskinrep, verður skjótt og væl úr hondum greitt
Tlf. 21125


**Ungmannafelagið »Lívdin«**

**Eykaaðalfundurin**

og aðalfundurin verða **leygardagin 3. april, kl. 16.00** í Djóna í Geilsgøtu 1.

**Nevndin**



**Handverksmeistarar!**

**Limafundur á Hotel Hafnia!**

Nú líður, at fyrsta uppgerðin av MVG-gjaldinum skal latast Toll- og Skattstovuni.

Havnar Handverksmeistarafelag vil nú gera eina síðstu roynd at kunna limir sínar um meirvirðisgjaldið og bjóðar til limafundar á Hotel Hafnia hóskvøldið 1. april kl. 19.00.

Á fundinum verða nakrir serkønir úr Danmark, sum hava ferðast um oyggjarnar teir seinastu dagarnar, saman við tveimum føroyingum, ið eisini eru serkønir í MVG-skipanini.

Møtið fjølmentir og spyrjið dúgliga ella ringið spurningar inn til skrivstovuna hjá felagnum, tlf. 12901 og fax. 10066

**Havnar Handverks-meistarafelag**




*Pauli Einarsson, maskinstjóri umborð á amerikonskum seismikkskip, Judi Neish, seismiskur serfrøðingur og Claus Reistrup frá Landsskúlafyrisitingini her við eini av teimum luftkanónunum, sum møguliga skjótt skulu brúkast til seismiskar kanningar við Føroyar Mynd kalmar*

*Amerikanskur seismikk-serførðingur vitjar:*

# Stórur áhugi fyri at byrja kanningar við Føroyar í ár

*Fleiri seismisk feløg eru klár til at fara undir seismiskar kanningar í føroyskum øki í summar. Tey bíða nú eftir einum útspæli frá føroyskum myndugleikum. Amerikanski serfrøðingurin í seismiskum kanningum, Judy Neish, sum vitjar í Føroyum í hesum døgum, sigur, at føroyingar hava onga vissu fyri, at áhugin verður eins stórur komandi ár. Í løtuni eru nógv skip tøk til at fara undir kanningar og tí er prísurin fyri hesar kanningar helst eisini tað lægri. Judi Neish mælir føroysku myndugleikunum til at gera sær greitt, hvat teir vilja og síðani biðja seismisku feløgini um uppskot um eina kanningarætlan. Og har eisini føroyingar so eisini at seta fram síni ynski.*

Í hesum døgum vitjar ein serfrøðingur í seismiskum kanningum í Føroyum. Tað er Judy Keser Neish úr USA. Hon heldur fyri-lestrar og skeið fyri næmingum við fleiri skúlar, fyri vinnulívsfólk, fakfelagsfólk og onnur áhugað. Vitjanin er komin í lag eftir ynski frá føroyingum, sum arbeiða umborð á seismiskum skipum í útlondum og annars øðrum føroyingum við tilknýti til eina møguliga komandi oljuvinnu. Eisini landsskúlafyrisitingin er inni í myndini.

Tað eru fýra feløg, sum fíggja vitjanina. Tey eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Handverkarafelag, Maskinmeistarafelagið, Verkfrøðingafelagið og Føroyar Arbeiðsgevarafelagið.

## Drúgvar royndir

Seismiski serfrøðingurin talan er um er ein amerikonsk kvinna. Hon eitur Judy Keser Neish og hevur drúgvar royndir innan seismisku vinnuna. Hon hevur fingið útbúgving á lærda háskúlanum í Portland, Oregon í USA og hevur seinastu 20 árini arbeitt í Thailandi, Australia, Alaska, Noregi og aðrastaðni við.

Síðani 1980 hevur hon búð í Onglandi, har hon hevur arbeitt fyri bæði oljufeløg og seismisk feløg. Hon hevur í dag sítt egna ráðgevarafelag, sum serliga ráðgevur oljufeløgum, ið keypa upplýsingar frá seismisku feløgunum. Tað er í hesum viðtangi, at hon er komin í samband við føroyingar. Ein teirra, Pauli Einarson, sum siglir við einum amerikonskum seismiskum skipi, hitti hana har umborð herfyri og spurdi hana, um hon ikki hevði havt áhuga fyri at koma til Føroya at greiða føroyingum frá um eitt nú møguleikarnar at fáa arbeiði í seismisku vinnuni.

Hetta var so byrjanin til teir fyrilestrar og skeið hon nú heldur ymsa staðni í Føroyum.

## Rímuliga góðir møguleikar

Vit spurdu Judy Neish, hvat hon heldur um møguleikarnar at finna olju við Føroyar.

-Eg havi kenslu av, at

→

